Tóshavn 01.01.2020

Hoyringsskriv viðv. lóg um arbeiðsloysisskipan

Feløgini í Samtak taka í høvuðsheitum undir við broytingunum, sum skotnar vera upp – við tí undantaki, at vit mæla til at hækka arbeiðsloysisstuðulin til í mesta lagi kr 20.000 um mánaðin. Hetta er sama upphædd, sum stuðulin var undir koronaskipanini, og er eisini upphæddin, sum fáast kundi úr Als-skipanini áðrenn stuðulin var lækkaður í 17.500 kr í 2012.

Fíggjarliga er arbeiðsloysisskipanin væl fyri, og meta vit, at skipanin væl klárar at bera ein stuðul á 80% við eini mestu upphædd á kr 20.000 um mánaðin. Vit heita tískil á landsstýrismannin, um at kanna henda møguleika og eisini fáa Als-stýrið at taka henda partin av stuðlinum upp til nýggja viðgerð.

Um hugt verður at sáttmálum á føroyska arbeiðsmarknaðinum í dag sæst, at byrjunarlønirnar liggja úr áleið 22.500 kr upp í 30.000 kr (Byrjunarlønin hjá einum arbeiðara er kr 23.207,15 og hjá einum BLF'ara kr 29.596,16 kr), men tá ið arbeitt hevur verið í nøkur ár liggja flest allir lønarbólkar ímillum kr 25.000 og kr 35.000 kr (onkur er nakað hægri meðan aðrar nakrað lægri) – hetta er inntøka fyri fulla tíð. Tá ið fólk gerast arbeiðsleys er lønarmissurin hjá teimum flestu tískil ógvuliga høgur.

Tíbetur er arbeiðsloysi lágt, og sum tað sær út á arbeiðsmarknaðinum í løtuni, so tykist ikki verða beinleiðis hóttafall fyri framman í Føroyum, hóast heimsumfevnandi koronasóttin hevur herjað í nakrar mánaðir, og helst fer at herja eina tíð afturat.

Arbeiðsloysisskráseting av nýggjum

Feløgini í Samtak heita samstundis á landsstýrið og stýrið í ALS um at hyggja at hugtakinum "arbeiðsleys", og at víðka skrásetingarhugtakið í ALS høpi soleiðis, at parttíðar arbeiðsloysi kann skrásetast og fáa heimild til útgjald. Um hugt verður at arbeiðsmarknaðinum í dag vita vit, at tað eru hópurin av starvsfólki, sum ikki fáa fulltíðararbeiði.

Um hugt verður at øllum størvum sæst, at ein rættiliga stórur partur av størvunum hava setanarbrøk, sum svarar til millum 0,5 og 0,8 ístaðin fyri fulla arbeiðstíð. Hetta sæst eisini aftur í nógvum størvum, ið leys eru at søkja. Starvið og tíðin er tó mangan soleiðis hátta, at til ber ikki at røkja annað starv, og trupult er eisini at fáa fleiri størv.

Samtak - stoffalág 17 – FO-100 Tórshavn
tlf 210013 - www.samtak.fo - samtak@samtak.fo

Hjá tímaløntum er mangan trupult at fáa javnt 40 tíma viku gjøgnum árið – talan er um steðgir orsaka av rávørutroti, veðri og øðrum árinum, sum løntakarin onga ávirkan hevur á.

Tað sum eisini sæst aftur er, at rætttiliga stórur partur av ymiskum størvum eru slík, sum í høvuðsheitum verða mannað av kvinnum. Vaskifólk, námsfrøðingar, heilsurøktarar og hjálparfólk til stovnar av ymiskum slagi eru sera ofta parttíðarstørv. Lønarliga sæst hetta eisini aftur í løngjaldingunum, sum eru munandi hægri hjá monnum ella kvinnum. Tað hevði verið frálíkt, um partarnir á arbeiðsmarknaðinum saman við landsstýrinum kundu greina hesi viðurskifti, og gjørt uppskot um, hvussu skrásetingin hjá ALS eisini kann víðkast til parttíðararbeiðsloysi, og hvussu parttíðararbeiðsleys skulu samsýnast.

Fyri løntakaran er neyðugt at skipanir fylgja tíðini, og tað er ein veruleiki, at nógv arbeiða niðursetta tíð, tí at til ber ikki at fáa fulltíðarstørv. Mælt verður samstundis til at hækka útgjaldið úr fiskavirkisskipanini til 40 tímar um vikuna í mun til 32 tímar um vikuna, og at dagføra skipanina fyri fiskimenn, hvørs skip skip vera løgd vegna umvælingar. Satsirnir í hesum skipanum eru eitt nú alt ov lágir vegna órímiligar mótrokningarhættir.

Viðvíkjandi útsettar pensjón

Eins og tað eisini er vorðið møguligt at útseta pensjónina er neyðugt at tryggja, at arbeiðsfólk og sjómenn yvir pensjónsaldur, sum hava útsett pensjónina, fáa heimild at fáa úr fiskavirkisskipanini og skipanini fyri fiskimenn, um tey annars lúka treytirnar.

Við nýggju pensjónsskipanini hava løntakarar fingið møguleika at útseta sína almenna pensjón, um tey annars lúka nakrar treytir. Fyri løntakarar, sum arbeiða á fiskavirkjum, er í ávísum tíðarskeiðum neyðugt at vera í fiskavirkisskipanini, tí arbeiði er ikki vegna rávørutrot, veður ella av øðrum ávum. Ein fylgja av broytingunum í pensjónsskipanini við útsettari pensjón átti tískil at verið, at teir løntakarar, sum hava útsett sína fólkapensjón, sjálvsagt skuldu havt møguleika at verið partur av fiskavirkisskipanini. Hetta sama eigur sjálvsagt vera galdandi fyri sjómenn, hvørs skip liggur vegna umvælingar.

Vinarliga vegna Samtak,

Georg F. Hansen, formaður í Føroya Arbeiðarafelag

Jan Højgaard, formaður í Føroya Fiskimannafelag

Jastrid W. Niclassen, forkvinna í Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag

Absalon Hansen, formaður í Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag